Búskapur og vinna:

## Minus til oljugrunnin

Fallið á altjóða virðisbrævamarknaðunum hevur eisini ávirkað úrslitið hjá norska oljugrunninum.

Fyrsti ársfjórðingurin royndist væl hjá oljugrunninum, men nú vísir tann seinasta uppgerðin, at í aprílársfjórðingi fall virðið á virðisbrøvunum og partabrøvunum, sum grunnurin eigur, 3,3 prosent.

60 prosent av pengunum hjá norska oljugrunninum eru settir í virðisbrøv og hini 40 prosentini í partabrøv.

## Húsini dýrka

Tað lítla arbeiðsloysið og tann lága rentan í Bretlandi ávirka nú húsaprísirnar. Sambært ráðgevingarfelagnum Nationwide hækkaði húsaprísurin 3,3 prosent í meðal í juni, og felagið væntar, at prísurin fer at hækka umleið 18 prosent í ár.

Búskaparfrøðingar vænta, at tann stóri prísvøksturin fer at noyða Bank of England at seta rentuna upp. Men aðrir serfrøðingar vísa á, at inflasjónin í Bretlandi er bert 1,8 prosent, og tað fer ikki at skunda undir eina rentuhækking.

Serliga í London-økinum er tað dýrt at keypa sær eini hús í dag. Sambært Nationwide er meðalprísurin í sjálvum London farin upp um 200.000 pund ella slakar 2,3 milliónir krónur.

## Nærkast gjaldssteðgi

Hildið verður, at tann kreppurakta amerikanska telefyritøkan WorldCom fer í gjaldssteðg fyrsta dagin. Mánadagin boðaði fyritøkan frá, at hon hevur steðgað afturgjaldingini av einum láni, og hetta tulka serfrøðingar sum fyrsta stigið ímóti gjaldssteðgi. Samstundis hevur fyritøkan sagt, at hon hevur víðkað kanningarnar, sum hava avdúkað umfatandi óreglusemi í bókhaldinum.

UTTAN ÚR HEIMI

# Flogskiparin aktaði ikki boð, fyrr enn tað var ov seint



Mynd: Reuters

**Flogskiparin á russiska ferðamannaflogfarinum var ov seinur at gera eftir boðum frá eftirlitinum. Tí stoyttu flogfar hansara og eitt flutningsflogfar saman**

FLOGSAMANSTOYTUR
*Árni Joensen*

Starvsmenninir í sveitsiska flogeftirlitinum róptu á flogskiparan umborð á tí russiska Tupolev TU-154-flogfarinum og bóðu hann taka flogfar sítt longur niður, tí eitt flutningsflogfar var á somu kós. Men russiski flogskiparin aktaði ikki boðini. Ikki fyrr enn sveitsisku eftirlitsmenninir høvdu rópt á hann tríggjar ferðir, tók hann flogfarið niðureftir, men tá var ov seint.

Teir báðir flogskipararnir, sum vóru einsamallir umborð á Boeing 757-flutningsflogfarinum, fingu eisini boð um, hvat var á vási. Teir royndu at broyta kósina, men ov seint var. Løtu seinni stoyttu tey bæði flogførini saman í 12.000 metra hædd uppi yvir Bodenvatninum har suðuri í Týsklandi.

Russiska flogfarið var á veg úr Moskva til Barcelona og hevði millumlent í Múnchen á vegnum. Flutningsflogfarið, sum flutningsfelagið DHL átti, var á veg úr Bahrein til Bruxelles.

Umborð á russiska flogfarinum vóru 57 ferðafólk og manningin, sum taldi 12. Av teimum 57 ferðafólkunum vóru umleið 50 børn og ungdómar.

Allan gjár leitaðu týsk bjargingarlið eftir vrakpettum og líkum nærhendis Bodenvatninum. Men arbeiðið var torført, tí vrakpetti sløgdust í einum øki, sum er umleið 30 ferkilometrar stórt.

Tann svarti kassin í tí russiska flogfarinum varð funnin í gjár. Kassan úr úr flutningsflogfarinum høvdu menn ikki funnið, og týsku myndugleikarnir siga, at hann er kanska dottin niður í Bodenvatnið.

Týski flutningsmálaráðharrin, Ulrich Múller, segði í gjár, at vanlukkan eftir øllum at døma stóðst av einum tí, sum hann kallaði eitt menniskjaligt mistak. Týsku loftferðslumyndugleikarnir siga, at annaðhvørt flogeftirlitið ella annar flogskiparin mistók seg.

# Pinochet sleppur undan rættarsókn

**Hægstirættur í Kili hevur steðgað rættarmálinum ímóti fyrrverandi einaræðisharranum, sum var ákærdur fyri morð og burturflytingar**

PINOCHET-MÁLIÐ
*Árni Joensen*

Fyrrverandi einaræðisharrin í Kili, Augusto Pinochet, sleppur undan rættarsókn. Tað avgjørdi hægstirættur í Santiago mánadagin. Sambært rættinum livir Pinochet so mikið illa, at hann er ikki førur fyri at fara undir eitt rættarmál.

Fyrrverandi einaræðisharrin, sum stýrdi Kili í 17ár, var ákærdur fyri brot á altjóða mannarættindini, morð og burturflytingar. Seinastu árini hava fleiri sakførarar roynt at fáa hann drignan í rættin, men hvørki teir ella onnur eru ovfarin av úrskurðinum hjá hægstarætti, verður sagt úr høvuðsstaðnum Santiago.

Fýra av teimum fimm hægstarættardómarunum atkvøddu fyri úrskurðinum, meðan tann fimti atkvøddi fyri, at Pinochet kundi koma fyri rættin. Teir fýra dómararnir siga, at tann 86 ára gamli Pinochet er so heilsuveikur, at rættarmálið ímóti honum kann ikki halda fram, og at tað kann heldur ikki takast uppaftur.

Sambært ákæruritinum var fyrrverandi einaræðisharrin ákærdur fyri at hava givið serligum drápsligum hjá herinum boð um at beina fyri viðhaldsfólki hjá sosialistisku stjórnini, sum Pinochet koyrdi frá í 1973. Umleið 3.000 fólk hvurvu tey 17 árini, Pinochet sat við valdið í Kili.

Úr Norðurlondum:

## Framvegis nei til ES

Ein meiningakanning í Noregi vísir, at tað er framvegis ikki meiriluti fyri norskum limaskapi í ES. 47 prosent av teimum spurdu siga, at tey høvdu atkvøtt ímóti limaskapi, var fólkaatkvøða nú, meðan 42,4 prosent siga, at tey høvdu atkvøtt fyri.

Samanborið við eina kanning fyri einum góðum mánað síðani hava bert fáir norðmenn broytt støðu. Tá vóru 47,2 prosent ímóti limaskapi og 41,5 prosent fyri.

Hildið verður, at tað er tann politiska tøgnin um ES-limaskapin, sum ger, at ongar broytingar eru. Serfrøðingar siga, at tað eru teir politisku flokkarnir, sum mugu fáa orðaskiftið í gongd, men í sitandi stjórnarsamgonguni er avgjørt, at ES-spurningurin skal fáa frið.

## Kostar eina mia. krónur

Tað fer at kosta Danmark umleið eina milliard krónur at hava formansskapin í ES tað næsta hálva árið, men tað er væl hugsandi, at tann endaliga rokningin verður uppaftur størri.

Tann største einstaka útreiðslan eru trygdartiltøkini, sum verða sera umfatandi teir næstu mánaðarnar. 4.000 løgreglumenn skulu til arbeiðis, tá ymsir fundir verða, og mett verður, at trygdartiltøkini fara at kosta einar 580 milliónir krónur. Men tað kostar eisini at fundast, og sjálvir fundirnir eru mettir at kosta donsku skattgjaldarunum 148 milliónir krónur.

## Nógv verdir

Ein nýggj virðismeting í Noregi vísir, at prestagarðarnir hjá norsku kirkjuni eru nógv meiri verdir enn higartil hildið. Eftir gomlu virðismetingini var virðið á prestagørðunum 580 milliónir krónur, men tann nýggja metingin sigur, at teir eru 1,1 milliard krónur verdir. Tað merkir, at í meðal er ein norskur prestagarður 2,4 milliónir krónur verdur.



# ítróttur

Nr. 124 • mikudagur • 3. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# 800 kaga inn á gólvið um dagin

**Heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag er plássið, har róðraráhugað hittast og fáa upplýsingar**

UPPLÝSING
*Jóannes Hansen*

Samskifti og upplýsing. Tað eru tvey av lyklaorðunum nú á døgum. Ikki minst tá tað snýr seg um ítrótt, ítróttarfólk og ítróttarkappingar verður nógv gjørt burturúr. Bæði úti í heimi og eisini í Føroyum.

Tað er synd at siga, at kappróðurin altíð hevur fingið so stóra rúmd. Burtursæð frá frásøgnunum í útvarpinum, sum hava verið á skránni, síðani Útvarp Føroya sá dagsins ljós í 1957, og sum hava verið væl umtóktar alla tíðina, so var í mong ár lítið gjørt burturúr.

Nú er eitt sindur av vend komin í, og tað er ikki minst á internetinum, at kappróðrarprátið gongur fyri seg, og at kappróðrartíðindi eru at frætta.



*Heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag man uttan iva vera mest vitjaða róðrarsíðan á alnetinum*

### Nógv vitja

Eingin ivi er um, at heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag er tann, har mesta ferðslan er hjá kappróðrarfólki og kappróðraráhugaðum.

– Nú, meðan kappróðrarárið er í hæddini, verður heimasíðan nógv vitjað. Frá sunnudegi og til mikudag liggur talið á vitjandi um átta hundrað um dagin. So fellur tað eitt sindur fram ímóti vikuskiftinum, men sunnudagarnar er talið aftur høgt.

Hetta sigur Kristian Eli Zachariasen. Hann er formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag, og tað eru hann og Fróði Waag, sum er kassameistari í felagnum og sum eisini rør við Klaksvíkinginum, sum standa fyri heimasíðuni, krf.fo.

– Mettalið av vitjandi var, tá kappingin var á Scilly oyggjunum. Tá dagførdu vit alla tíðina, og tá lá talið á vitjandi onkran dagin uppi á fimtan hundrað, greiðir Kristian Eli Zachariasen frá.

### Nógv tilfar

Nógvar heimasíður, sum hava við ítrótt og ítróttarfeløg at gera, síggja veruleikan út frá sínum sjónarhorni. Tað vil so vera. Heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag sær eisini veruleikan út frá støðuni hjá felagnum, men skrivingarlagið og tilfarið, sum eru á heimasíðuni bera boð um, at málbólkurin ikki bara eru tey, sum eru í og sum hava áhuga í Klaksvíkar Róðrarfelag.

– Vit royna at leggja okkum eftir ikki at vera so ógvuliga lokalir. Vit ynskja, at tað skal vera áhugavert hjá øllum kappróðraráhugaðum at koma inn á síðuna. Vit halda, at talið á teimum vitjandi boðar frá, at fólk sum heild eru nøgd við síðuna, staðfestir formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag.

Úr rúgvuni av tí, sum er at finna á krf.fo, er myndarøð av endaspurtunum og myndir av vinnarunum. Kristian Eli Zachariasen var í Vági leygardagin, og longu sunnudagin vóru myndir frá tí kappingini at síggja á heimasíðuni. Har eru úrslit og tíðir og støður í kappingunum, og so eru samrøður við rógvarar. Ikki bara úr Klaksvík, men eisini úr fleiri av hinum feløgunum.

Á nógvum heimasíðum eru nógvar lýsingar. Á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag er búmerkið hjá høvuðsstuðlinum hjá felagnum. Tað er Norðoya Sparikassi. Har er okkurt annað búmerki, men har eru ikki nógvar lýsingar.

Høvdu tit ikki havt møguleika at vunnið fitt at pengum burturúr síðuni, tá tað eru so mong, sum vitja tykkum?

– Vit hava ikki hugsað soleiðis. Higartil hevur hetta verið eitt frítíðarítriv hjá okkum, sum vit halda er spennandi og stuttligt. Fyrst og fremst tí vit hava stóran áhuga í kappróðri. Um tað fara at verða fleiri lýsingar á síðuni, veit eg ikki. Tað fer tíðin at vísa. Fyribils gleðast vit um, at undirtøkan hevur verið so góð, sum hon hevur verið higartil, sigur Kristian Eli Zachariasen, sum veit um fleiri útisetar, sum brúka heimasíðuna krf.fo at kunna seg um gongdina í kappróðrinum í Føroyum.

# Miðvingar mugu laga seg eftir sjóvarfallinum

**Kappróðurin í Vági gekk sum smurt, og tað kann roknast við, at tað fer at ganga uppaftur skjótari, tá tað annan leygardag fer at verða kappast í Miðvági**

FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*

Formaðurin í Róðrarsambandinum hevur fyrr í summar sagt her í blaðnum, at tað næstan er vorðin ein eyka kapping, at fyrireikararnir av kappróðrunum eru so nærlagdir, tá teir gera klárt til kappingina, og tá tað verður kappast.

Teir í Vági stóðu avgjørt einki aftanfyri hinar, sum hava havt ábyrgdina av kappróðrunum. Undanfarin ár hava vit fleiri ferðir víst á óskikkin, sum tað hevur verið, at tað ikki hevur verið klárt at senda fyrstu bátarnar avstað klokkan trý. Tað hevur bitið seg í hælan soleiðis at skilja, at tað hevur drigið langt út, áðrenn 10–mannaførini hava róð.

At hesin óskikkurin nú er fullkomuliga burtur var týðuligt í Vági. Kanska restaðu klokkuni nøkur sekund í trý, tá 5–mannaførini við dreingjum vórðu send avstað, og klokkan var fimm minuttir í hálvgum fimm, tá Nólsoyingurin sum tað síðsta av teimum fimm 10–mannaførunum kom á mál.

– Alt gekk upp á stás. Onkra ferðina noyddust vit, sum vóru inni á málinum, at rópa á teir úti á málinum um at bíða eitt sindur, tí vit vóru ikki heilt klárir. Tað er ikki komið fyri ofta áður.

Tað sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum, sum sjálvsagt er sera fegin um, at tað framgongdin á hesum økinum, sum er so týdningarmikið fyri áhugan hjá rógvarum og áskoðarum, hevur verið so stór tey seinastu árini.

– Sjálvandi er tað øðrvísi at hava ábyrgdina, tá tað verður róð á øllum trimum málunum, enn tað er, tá tað bara verður róð á 1000 metrum. Men higartil hava allar kappingarnar gingið sera væl, ikki minst tí fyrireikingarnar hava verið til UG, heldur Hannis Joensen.

### Metið í Miðvági

Annan leygardag verður kappróður í Miðvági. Har verður bara róð á 1000 metrum ella kanska á eitt sindur styttri teini enn so. Róðrarøkið er frá grótkastinum og inn ímóti sandinum niðanfyri fótbóltsvøllin.

Tá tað fyri fýra árum síðani varð kappast á hesum teininum, vóru allar kappingarnar av, tá klokkan var seks minuttir yvir fýra. Tað ber ikki til at avgreiða róðrarnar skjótari enn so, og tað er heldur eingin orsøk til tað. Bæði róðrarfólkið og áskoðararnir á økinum og frammanfyri útvarpstólini skulu hava tíð til at sodna kappingarnar og úrslitini, og tað skal helst ikki verða soleiðis, at tað ikki verður tíð til at heiðra bátar, bygdir og býir við vinnarasangum.

Tað ber bara til at rógva kapp í Miðvági, tá tað er fløðandi sjógvur. Tí verður kappróðurin annan leygardag ikki klokkan 15, sum hann vanliga plagar at vera. Hannn verður eitt sindur seinni, men akkurát nær fyrsti starturin verður, fingu vit ikki at vita í gjár.